# LANDSROYND 6. FLOKKUR

mars 2011

## Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir ímillum skrástrikurnar lisnir tvær ferðir. Punktum og komma verða lisin. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Loyvt er næmingunum at hava við sær til royndina, orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í vanligu undirvísingini í føroyskum í 6. flokki.)

**Vágur**, t. 5. **mars** 2011/

**Góði Pætur /**

**Í dag hendi/ nakað** sera **stuttligt/ í** skúlanum. **Vit prátaðu** um,/ **hvørjar** oyggjar **í Føroyum**,/ vit **høvdu vitjað**,/ **tá ið** flokslærarin/ **hjá** okkum **segði**,/ at hann **ætlaði/** at **fara** á **seturskúla/** við **okkum/ seinni í** mánaðinum./ **Fyrst** helt **eg,/ at** vit **skuldu** fara/ **onkran stuttan** túr,/ **men hann hevði/** heilt **aðrar ætlanir**./

**Tú kanst** ikki **gita**,/ **hvar** vit fara./ **Vit fara** til **Toftir/** í **fýra dagar/** og **skulu búgva/** í ítróttarhúsinum **á** Svangaskarði./ Eg **veit**, at **tú/ eisini hevur verið/** har **við flokkinum**,/ og helst **hevur tú/ eisini sæð/ nógvar** fótbóltsdystir/ á **grasvøllinum** á **Toftum**,/ **tí eg** veit,/ **hvussu stóran** áhuga,/ **ið** tú hevur/ **fyri føroyska landsliðnum**./

**Eg havi aldri** /áður **verið** á **Toftum**,/ so **eg gleði meg /so nógv**./ **Tað** er so **tíðliga/** á **árinum**,/ at vit **neyvan/ sleppa** at **síggja/ nakran** f**ótbóltsdyst**,/ **men** vit s**leppa/** at **nýta vøllin/** so **nógv,/ sum** vit **hava/ hug** til./

Umframt **at spæla**/ á vøllinum **skulu vit** /eisini **gera/ ymiskt annað**./ **Eg veit**,/ at vit **skulu/ vitja** Fríðrikskirkjuna,/ **sum** eg **bara/ havi sæð** á **myndum**./ **Hon sær/ sera vøkur út / og** er **eisini/** ein av **nýggju** kirkjunum**/ í Føroyum**./

**Ætlanin** er **eisini/** at **fara/ ein langan rennitúr/** runt **um** Agnið./ **Eg haldi**,/ at **teinurin** er /**umleið** 10 km /**til longdar,/ so vit vera /helst troytt** tann **dagin**./

**Vónandi síggjast/ vit skjótt**./

**Blíðar heilsanir**

**Maria/**